NORÐURLENDSKA

# BARNAVIÐTØKAN

Í sambandi við 30 ára dagin fyri

## Barnarættindasáttmálan hjá Sameindu Tjóðum.

Keypmannahavn 16. Januar 2020.

Denmark, Finland, Iceland, Norway, Sweden, **The Faroe Islands**, Greenland and Åland.

**Vit, børn og ung úr Danmark, Finlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki umframt Føroyum, Grønlandi og Álandi vilja deila okkara viðmæli til, hvussu Norðurøkið kann gerast besta stað í heiminum at vera barn við norðurlendskar leiðarar bæði lokalt og millumtjóða.**

Tað er av størsta týdningi, at vit kunnu vera vit sjálvi og verða vird sum teir persónarnir, vit eru, uttan at koma at uppliva mismun, happing ella fáa aðra niðrandi viðferð.

Vit eru virðismikil. Vit eru virðismikil fyri alt, vit eru, fyri tað vit eru móti øðrum, eins væl og fyri alt, vit kunnu gerast í framtíðini. Vit fara skjótt at koma hagar, vaksin eru í dag og fara at velja ella stilla upp til val at tæna almenninginum. Vit eru framtíðin, men vit eru eisini børn og ung av nútíðini við okkara egnu rættindum.

Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki umframt Føroyar, Grønland og Áland hava øll samtykt Barnarættindasáttmálan og sostatt sum minsta mark komin ásamt um at virða viðtøkurnar í honum.

Grein 12 í Barnarættingasáttmálanum sigur, at børn hava rætt til frítt at bera fram síni sjónarmið í málum, sum viðvíkja teimum.

Okkara viðmæli her niðanfyri fevna um tey øki, har vit brúka tað mesta av okkara tíð (okkara familju, okkara skúla, okkara frítíðarviksemi og okkara nærumhvørvi). Viðmælini eru ætlað øllum teimum, sum taka avgerðir á hesum økjum, men vit heita eisini á tey innanlands og á norðurlendskum stigi gjøgnum Norðurlendska Ráðharraráðið at stuðla upp undir, at okkara viðmæli fara at virka.

**Við hesum viðtøkum vilja vit tryggja, at okkara røddir verða hoyrdar.**

**Vit vilja tryggja, at øll vit børn og ung í Norðurøkinum eru varug við okkara rættindi.**

# VARHUGI UM BARNARÆTTINDI

*Vit halda hetta hevur týdning, tí bara soleiðis kunnu vit skilja og eyðmerkja støður, har okkara rættindini verða brotin og virka fyri, at tað hendir. Barnarættindini eru fyri at styrkja og verja børnini. Við at vera medvitandi um okkara rættindi, kunnu vit tryggja okkara egnu vælveru, lívsgóðsku, virðing fyri rættindum hjá øðrum og menna førleikan at vera við til at taka avgerðir, sum ávirka okkara egna lív.*

**Vit mæla til, at:**

- Vit læra um barnarættindi í undirvísing við okkara javnaldrum: børn skula hava møguleika at undirvísa øðrum børnum um teirra rættindi, og okkum tørvar positivar fyrimyndir av ungum fólki at tosa um barnarættindini. Vit børn kunnu skriva og taka okkara egna tilfar upp og fáa okkara røddir fram við at brúka appir, podcastar ella sosialar miðlar.

## Familjur

- Bæði vit – og vaksin – læra um rættindi hjá børnum og barnarættindasáttmálan hjá ST. Øll hava brúk fyri at kenna munin á rættindum og fyrimunum.

- Foreldur hava ein serligan leiklut í at læra okkum um barnarættindini. Foreldur eiga at taka sær stundir at tosa við okkum um týðandi og trupul mál fyri at koma fram til, hvat er í lagi, og hvat ikki er í lagi. Foreldur eiga at fáa kunnleika um rættindi hjá børnum gjøgnum sosialar miðlar ella á skeiðum, sum lokalir politikarar ella fólk í nærumhvørvinum skipa fyri.

## Skúlar

- Rættindi hjá børnum og barnarættindasáttmálin er tikin við í øll stig í skúlanum frá fyrsta flokki.

- Í skúlunum eigur undirvísingin í rættindunum hjá børnum at fara fram eftir skiftandi mannagongd og samrøðum fyri at tryggja, at vit børn eru við av heilum huga. Evnisvikur, skeið ella mánaðarligir fyrilestrar við ymiskum vinklingum kunnu brúkast í undirvísing, sum leggur serligan dent á rættindini hjá børnum. Skúlar eiga eisini at hava kunning um rættindini frammi á sjónligum støðum í tí høpi, har tað tykist

viðkomandi til dømis sum kunning um heilsu í matsalinum.

- Í øllum skipaðum dagtilhaldum og barnatiltøkum eiga rættindini hjá børnum at vera sjónlig og atkomilig.

## Fríðtíðarvirksemi

- Bæði í skipaðum og óskipaðum frítíðarvirksemi eigur at verða bjóðað til, at børn hava ávirkan og eru virkin. Á hesum økjum fáa vit høvi at vísa á okkara tørv, læra um okkara rættindi og tosa um málið við okkara vinir um, hvussu týðandi rættindi hjá børnum eru.

- Í ítrótti og øðrum frítíðarfelagsskapum fáa nevnd, venjarar og umsitarar skeið í rættindum hjá børnum, so tey verða før fyri at samskifta við okkum um málið og skapa karmar, ið virða rættindini hjá børnum í felagsskapinum.

- Rættindi hjá børnum skula verða meiri sjónlig bæði í miðlunum, listini og leikhúsum. Kunning um rættindi hjá børnum eigur at vera minni teksttung, men eisini minni barnslig.

- Venjingar, sjónvarpssendingar og YouTube lýsingar kunnu brúka kend ella ungdómsleiðarar, ið kunnu eggja okkum børnum meiri til og tryggja okkara rætt at vera við, eisini til at taka avgerðir.

## Kommunur

- Kommunur kunnu skipa fyri barnarættindastevnu, ella lýsingar kunnu verða gjørdar, sum vekja uppmerksemi fyri og kunna um øll rættindi hjá børnum. Hesi átøk kunnu verða skipað saman við okkum børnum. Átøkini kunnu vera á YouTube, í einum bussskýli, á øðrum sjónligum støðum ella við almennum tiltøkum ella námskeiðum.

- Rættindini hjá børnum eiga at verða tikin við og raðfest í lokalum og landspolitikki. Kommunurnar eiga at skipa spurnakanningar við okkum børnum á valstøðum til lokal val fyri at hoyra okkara røddir um og vekja uppmerksemi um barnarættindi. Hetta eigur eisini at fara fram til løgtingsval.

- Øll vaksin, sum arbeiða við børnum í kommunalum ella landshøpi, í ráðunum undir landsstýrinum fáa miðvísa undirvísing í barnarættindum, so tey kunnu taka tey við í sítt dagliga virki.

**Vit vilja tryggja, at allar røddirnar hjá børnum og ungdómum í Norðurøkinum verða hoyrdar, og at tey á meiningsfullan hátt verða tikin við upp á ráð í øllum málum, sum viðvíkja teimum.**

# AT FÁA BØRN OG UNG VIRKIN

*Vit halda hetta hava týdning, tí vit børn eru serfrøðingar, meðan vaksin og tey, sum taka avgerðir, vita ikki, hvussu tað er at vera barn í dag. Tá ið okkara røddir verða hoyrdar, føla vit, at vit eru før fyri at hava ávirkan á okkara egnu mál, og tað gevur okkum megina at gera mun á okkara egna lív og á lívini hjá øðrum børnum.*

**Vit mæla til at:**

- Vaksin altíð spyrja okkum, áðrenn avgerðir, sum viðvíkja okkum, verða tiknar. Spyrja tit okkum, geva vit tykkum besta grundarlagið at taka avgerðir á væl kunnaðum grundarlagi. Hetta átti at verið gjørt eftir kanningar, sum kunnu geva ovmikið av hagtølum og upplýsingum. Tit áttu eisini at tikið til eftirtektar hugskot, tilmæli, meiningar og umbønir, sum vit hava givið tykkum frammanundan.

- Vit hava brúk fyri fleiri møguleikum at siga okkara meining. Vit hava eisini brúk fyri at vita, hvussu vit kunnu gera so, og hví tað hevur týdning.



## Familjur

- Í familjum verður tosað um vælveruna og rættindini hjá børnum, og tað er har børn hava høvi at bera sínar tankar fram, serliga í stórmálum um familjuna so sum hjúnaskilnað, flyting og líknandi. Familjur seta virknar "familjuløtur" av nakrar ferðir um vikuna.



## Skúlar

- Næmingaráð eru kravd í øllum almennum skúlum, og tey tryggja, at vit børn verða tikin við upp á ráð. Neyðug tíð og fíggjarligar umstøður skula setast av til at geva lærarunum høvi at stuðla og ráða okkum í at skipa okkum og skipa fyri næmingarráðsfundum, arbeiðsgongdir skula gerast, so at flokslærarar og næmingaumboð tosa um skránna á næstkomandi næmingaráðs fundi við øllum børnunum, fyri soleiðis at tryggja, at øll hugskotini, sum børnini koma við, verða tikin til viðgerðar.

- Arbeiðast skal fyri at fáa førleikaskerd børn inn í skúlan. Arbeiðast skal fyri at fáa børn við sálarligum avbjóðingum við í sosiala og samfelagsliga lívið gjøgnum munagóðar skipanir og útvega stuðul til tess frá sálarfrøðingum.

- Politikarar vitja okkara skúlar og samkomur, har børn brúka sína tíð. Tá tey vitja, kunnu tey spyrja børnini, hvat teimum dámar og hava brúk fyri. Ber ikki til hjá politikarum at vitja okkara skúlar, kunnu teir senda okkum spurnabløð og biðja um okkara ískoyti upp á tann mátan í staðin.

## Frítíðarvirksemi

- Øll vit børn hava førleikan at orða okkara egnu ynski og tankar og føla, at vit eisini kunnu takast við upp á ráð í frítíðarvirksemi. Regluligir fundir við okkum kunnu skipast um okkara ætlanir – og niðurstøður frá fundunum eiga at verða kunngjørdar alment og deildar við nærumhvørvið, fyri at vit skula føla, at vit eru hoyrd.

## Kommunur

- Ungdómsráð eru sett á stovn í øllum kommunum at tryggja, at vit upp á ein meiningsfullan máta verða tikin við í øllum málum, sum viðkoma okkum og eru tikin við í tilgongdini, har avgerðir verða tiknar. Tá ið okkurt skal broytast, grundleggjast ella endurskoðast í nærumhvørvinum, verða neyðugu ráðini tikin í kommununi at tryggja, at vitan um okkara sjónarmið verða fingin til vega. Umframt ungdómsráðini skal tryggjast, at vit børn kunnu vera við í politiskum felagsskapum og næminga- og studentaráðum á kommunalum stigi.

- Regluligir fundir millum umboð fyri børn og ung við tey, sum taka avgerðirnar, so sum løgmaður, landsstýrisfólk, borgarstjórar, kommunalar nevndir, virki og onnur leiðandi um rættindi hjá børnum eiga at verða fyriskipaðir.

**Vit vilja tryggja, at øll børn og øll ung í Norðurøkinum gerast virðismiklir partar av samfelagnum, so vit í felag kunnu basa ella forða mistrivnaði og einsemi.**

# INKLUSJÓN OG AT VERÐA PARTUR AV NÆRUMHVØRVINUM

*Vit halda hetta hevur týdning, tí tað at verða útihýstur frá nærumhvørvinum kann hava negativt langtíðarárin á okkum. Inklusjón hinvegin gevur okkum kensluna av nærleika, vinalagi og kensluna av at hava týdning og at vera góðtikin. At meta og fara við børnum, sum vóru tey ein týdningarmikil partur av samfelagnum fer eisini at styrkja okkara tilknýti og hug at gera samfelagnum og øðrum fólki væl.*

**Vit mæla til at:**

- Kunningarátøk um grein 2 av Barnarættindasáttmálanum eiga at verða hildin fyri at hjálpa okkum at skilja, at vit øll eru jøvn, og øll eiga at vera partur av samfelagnum.

## Familjur

- Vaksin og foreldur ganga upp í menningina hjá sínum børnum. Familjur tosa við okkum um mál, so sum at hava væleydnað vinabond, tað sum hendir online og avbjóðingar í skúlanum, um eitt barn følir seg diskriminerað, verður happað ella kennir seg einsamalt. Tey lurta, fáa okkum at kenna okkum trygg at leggja uppí, um neyðugt er at gera tað. Foreldur kunnu eisini deila persónligar upplivingar frá sínum egna lívi at vegleiða okkum.

## Skúlar

- Í skúlanum eiga børn og lærarar at víðka prátið um happingina og finna mátar at steðga henni.

- Har átti eisini at verið størri uppmerksemi um sinnislig heilsumál at fyribyrgja sundurlyndinum í samfelagnum. Uppmerksemið um sinnislig heilsumál áttu at verið tikin við í lesiætlanina, og tað átti at verið normaliserað og gjørt lættari hjá børnum at fingið hjálp í málum, ið snúgva seg um sinnislig heilsumál.

- Í skúlanum hevur hvørt barn ein vaksnan, sum tey kenna seg trygg við, at tosa við.

- Okkara rættur til privatlív eigur at verða virt, lærarar eiga at stuðla børnum, sum koma aftur í skúla eftir fráveru orsakað av persónligum málum og avbjóðingum í okkara lívi. Áðrenn tey koma aftur, eigur skúlalærarin at tosa við barnið fyri at taka barnið við upp á ráð um, hvat skal deilast við floksfelagarnar, og hvussu lærarin kann eggja floksfeløgunum at vera fittir og inkluderandi aftaná, at barnið er komið aftur.

- Tað er avgerandi fyri okkum, at skúlaheilsufrøðingar eru tøkir hvønn dag í viku í øllum skúlum, og at vit hava møguleikan at vitja skúlasálarfrøðingin ella sosialráðgevan á skúlanum, um tað er tað, vit hava hug til. Hesi fólk eiga at vera atkomilig, eisini hvat viðvíkir kostnaði av tí, at fleiri familjur hava ikki fíggjarligu førleikarnar at hjálpa sínum børnum.

## Frítíðarvirksemi

- Øll børn hava somu møguleikar til frítíðarvirksemi, sama hvørjari kommunu barnið býr í, ella hvussu fíggjarstøðan hjá familjuni er, ella hvørji tey eru. Frítíðarvirksemi er ókeypis, og útreiðslur í sambandi við útgerð verða fíggjaðar við fíggjarligum stuðli ella líknandi skipan.

- Vit hava stundir at spæla og hugna okkum. Vit læra fyri at kunna virka saman við nýggjum fólki við opnum sinni, og vit læra eisini, hvussu vit kunnu vera við til at styrkja samanhaldið, til dømis gjøgnum tiltøk í nærumhvørvinum.

- Frítíðarvirksemi eigur at vera opið frá tíðliga á morgni, so børnini hava eitt stað at fara, tá ið tey kenna seg einsamøll. Aftrat tí eiga at vera tøkir almennir flutningshættir at tryggja, at vit øll hava møguleika at koma til frítíðarvirkni.

## Kommunur

- Kommunur skula tryggja, at uppskot og hugskot frá okkum øllum, eisini børnum í viðkvæmari støðu, eru hoyrd. Politikarar, støðutakarar og vaksin skula gera tað léttari hjá nýggja ættarliðnum at vera við í samfelagnum.

- Tiltøk, ið umrøða einsemi, verða skipað í lokala samfelagnum, har tosað verður um støðuna hjá persónum við serligum áhugamálum.

- Alt tos um rættindini hjá børnunum eigur at verða sett í samband við veðurlagsbroytingar. Um vit ikki berjast ímóti veðurlagsbroytingum, fara vit ikki at liva at undirvísa øllum í teirra rættindum.

- Myndugleikar gera alt tað, teir eru mentir, at seta í verk Barnarættindasáttmálan.

**Vit, børnini, sum eru við í Norðurlendska barnasamtakinum, tann 16. januar 2020 í Keypmannahavn, skriva undir hesa viðtøku:**



Iina Räsänen

...a Mathiesen Louise J

Yiai

...riri Mølgaard Kleist

Wallmeroth Muriel

Liina Silja Lees Tuva

...i Pajukangas

...edinsdóttir Gylta Neystabø

Bella Winther Jakupsdóttir

...k Julia S. Samuelsen Brima Sólstein

...ün Julia Strand Hjördis Freyja Sylvester Hummer

...tarvelta Matias

...ud Salma Kukkola mikkel lundgaard

jacobsen Sarah Berg Pedersen Jóhanna Helga

...A. Rúnadóttir Olivia Neander Oliver F. Fagerlund

...an Mortensen Maalie TINE WESTBY-THORSTAD

...ne Södergren LEONA.F. Samuel Dreyer

12

VIRÐIÐ SJÓNARMIÐINI HJÁ BØRNUNUM